MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Dagfesting: 17. oktober 2007
Málnr.: 060349

**Løgtingsmál nr. xx/2007: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirskúlar**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirskúlar**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 17, stk. 2, nr. 1 og 2 verða orðað soleiðis:

"1. Til løn til skúlaleiðara og lærarar verður í mesta lagi latið 70% av kostnaðinum.

2. Landsstýrismaðurin kann útvega góðkendum sjálvsognarstovni stuðul, sum rentu og avdráttarfrítt lán við 1. veðrætti í bygninginum, sambært hesi lóg, sum í mesta lagi er 50% av virðismetingini til keyp av húsum, nýbygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla, ella stuðul til í mesta lagi 50% av upprunaláni til keyp av húsum, nýbygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla, til rindan av avdráttum og rentum av láni, sum sjálvsognarstovnurin tekur upp í peningastovni. Stuðulin verður at inntraðka í veðhaldið við 1. veðrætti hjá peningastovninum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Kap. 1 Almennar viðmerkingar

Endamálið við uppskotinum er at broyta verandi løgtingslóg um eftirskúlar, soleiðis at lógin heimilar landsstýrismanninum at veita stuðul til rindan av avdráttum og rentum av láni, sum sjálvsognarstovnur tekur upp í peningastovni, til keyp av húsum, nýbygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla. Stuðulin frá landinum kann sambært uppskotinum í mesta lagi verða 50 % av upprunaláninum.

Í uppskotinum verður eisini skotið upp, at broyta verandi lóg, soleiðis at landið framyvir kann veita stuðul til lønir hjá skúlaleiðara og lærarar á eftirskúlum, meðan kommununar rinda útreiðslurnar til annan rakstur, eins og tað verður gjørt í fólkaskúlanum.

## Kap. 2 Fíggjarligar avleiðingar

**Fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan**
Uppskotið hevur við sær at landskassin, í mun til verandi lóg, ikki skal rinda stuðul til annan rakstur av eftirskúlum, útyvir at veita partvísan stuðul til lønir hjá skúlaleiðara og lærarum.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri landsmyndguleikar.

**Talva yvir avleiðingar av uppskotinum**

| | Fyri landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri øki í landinum | Fyri ávísar bólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Hoyring**
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

## Kap. 3 Serligar viðmerkingar

**Til § 1, nr. 1**
nr. 1:
Ásett verður, at landið kann veita eftirskúlum stuðul til lønir hjá skúlaleiðara og lærarum. Stuðulin kann í mesta lagi verða 70 % av kostnaðinum.

Orsøkin til hesa broyting er, at mett verður, at núverandi lóg er skeivt orðað, soleiðis at stuðul verður latin til rakstur bæði frá landi og kommunum. Í fólkaskúlanum rindar landið læraralønir, meðan kommunurnar rinda allan annan rakstur. Tí verður skotið upp at gera hesa broyting.

nr. 2:
Ásett verður heimild hjá landsstýrismanninum at veita stuðul til rindan av avdráttum og rentum av láni, sum sjálvsognarstovnur tekur upp í peningastovni, til keyp av húsum, nýbygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla. Stuðulin frá landinum kann sambært uppskotinum í mesta lagi verða 50 % av upprunaláninum.
Eisini verður ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna sjálvsognarstovnar sum søkja um stuðul frá landinum, áðrenn stuðul kann verða veittur, og at landið sum trygd fyri stuðulsupphæddini tryggjar sær 1. veðrætt í bygninginum, og um talan er um stuðul til rindan av avdráttum og rentum av láni, sum sjálvsognarstovnurin tekur upp í peningastovni, so verður stuðulin at inntraðka í veðhaldið við 1. veðrætti hjá peningastovninum.

Orsøkin til hesa broyting er, at mett verður, at fíggingarhátturin, sum eitt nú hevur verið nýttur í sambandi við byggingina av miðnámsskúlanum við Marknagil í Tórshavn, eisini eigur at verða ein møguleiki í sambandi við fígging av eftirskúlum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Mentamálaráðið, 17. oktober 2007

**Jógvan á Lakjuni**
landsstýrismaður

/ Petur Petersen

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo